# KÍF fór frá

**MANSHONDBÓLTUR** Kollfirðingar vunnu við 11 málum á botnliðnum. Nærmastu kappingarneytarnir fingu ikki fult, og KÍF fór tískil frá í stríðnum um finalupláss

Uni Holm Johannesen

KÍF, nummar tvey, er nú fimm stig framman fyri nummar Kyndil, sum er nummar trý.

Í so máta var talan um eitt væleydnað vikuskifti hjá kollfirðingum. Teir fingu ikki stórvegis mótstøðu, tá Team Klaksvík vitjaði. KÍF hevði kós móti sigrinum beinanvegin, og botnliðið hótti ongantíð.

Kollfirðingar kundu hinvegin dúva uppá, at VÍF og Kyndil, sum togast við KÍF um annað finaluplássi, snávaðu. Tað gjørdu tey. Kollfirðingar øktu sostatt um fjarðstøðuna niður til hini liðini.

### Trygvason var toppskjútti

Team Klaksvík fekk fyrsta málið, tá seks minuttir vóru spældir í gjár. Tá hevði heimaliðið skotið fimm mál, og gestirnir runnu aftaná frá fyrsta bríksli.

Jákup Trygvason gekk undan hjá KÍF í gjár. Hann var tryggur, tá hann hevði møguleikan at skjóta. Hann fekk 10 mál í alt.

*uni@sosialurin.fo*

## **KÍF – Team Klaksvík** 37-26 (18-12)

Dómarar: Heri Petersen og Dánjal Samuelsen

**10 min.: 7-2**
**20 min.: 11-6**
**40 min.: 21-15**
**50 min.: 27-20**

**KÍF:** Jákup Trygvason 10, Arnbjørn Hansen 6, Niklas Reginsson 5, Ingi Johannesen 5, Suni Johannesen 3, Teitur Joensen 2, Hans Eli Sigurbjørnson 2, Agnar Joensen 2, Arnar Dam, Pætur Johannesen 1.
**Team Klaksvík:** Hanus Norðberg 9, Jón Jacobsen 4, Sámal T. Olsen 3, Steffan Kalsø 3, Dánjal Kjærbo 3, Mathias Samuelsen 2, Beinur Heðinsson 1, Andrias Ellingsgaard 1.
Útvísingar: KÍF 4 – Team Klaksvík 6

## **Kyndil – StÍF** 19-19 (10-9)

Dómarar: Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen

**10 min.: 5-2**
**20 min.: 10-5**
**40 min.: 12-12**
**50 min.: 16-15**

**Kyndil:** Bárður Johannesen 10, Hans Áki Dal-Christiansen 4, Andrias Sólsker 3, Julian Johansen 1, Rúni Johansen 1.
**StÍF:** Marius Joensen 7, Pætur Joensen 3, Leivur Justinussen 3, Bent Djurhuus 1, Artur Johansen 1, Jørmund Joensen 1, Jógvan G. Joensen 1, Fróði Djurhuus 1.
Útvísingar: Kyndil 2 – StÍF 2

## **VÍF – Neistin** 28-31 (13-12)

Dómarar: Kristian Joensen og Karstin Joensen

**VÍF:** Bjarti Hansen 5, Sámal Joensen 4, Jákup A. Andreasen 4, Magnus Muller 4, Áki G. Olsen 4, Joen Pauli Høgnesen 2, Rúni Fossdal 2, Holgar Durhuus 2, Sámal Jákup Djurhuus 1.
**Neistin:** David Edvardsen 9, Jugoslav Djumic 7, Áki Mørk 6, Heini Hanusarson 4, Sjúrður Thomassen 3, Jákup Apol 1, Ingi Olsen 1.

### Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 14 | 494 | 384 | 110 | 27 |
| 2 | KÍF | 14 | 402 | 361 | 41 | 19 |
| 3 | Kyndil | 14 | 353 | 347 | 6 | 15 |
| 4 | VÍF | 14 | 387 | 355 | 32 | 14 |
| 5 | H71 | 12 | 311 | 314 | -3 | 12 |
| 6 | StÍF | 14 | 341 | 357 | -16 | 7 |
| 7 | Team Klaksvík | 12 | 264 | 434 | -170 | 0 |

# Neistin var sløknaður fyrstu løtuna

**MANSHONDBÓLTUR** Neistin hevur smávegis trupulleikar við at seta seg upp til landskappingardystirnar. Tað var ikki fyrr enn í seinna hálvleiki, tá VÍF var á odda, at Neistin setti ferðina upp



*David Edvardsen var toppskjútti við 9 málum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Uni Holm Johannesen

Ingi Olsen, venjari hjá Neistanum, viðgekk síðsta vikuskifti, at tað er ein trupulleiki hjá Neistanum at seta seg upp til landskappingardystirnar. Liðið fær ikki stórvegis mótstøðu frá hinum liðunum. Neistin hevur bara mist eitt stig higartil.

Tað sást serliga væl í gjár, at neistamenninir vóru ikki motiveraðir fyrstu løtuna. VÍF fekk skjótt leiðsluna, og verandi greipuvinnararnir runnu mest sum bara aftaná. Vestmenningar vóru eisini á odda við einum máli í hálvleikinum.

Men so setti Neistin ferðina upp.

### Vunnu uppiborið

Tað tóktist sum, at neistamenninir skuldu veruliga kenna á sær, at teir høvdu kós móti einum tapi, áðrenn liðið tók sær um reiggj.

Neistin rann aftaná í fyrra hálvleiki, togaðist við vestmenningar fyrstu løtuna í seinna hálvleiki, men so fóru greipuvinnararnir so smátt undan.

David Edvardsen hevði eitt framúrskarandi kappingarár í fjør. Hann hevur ikki verið mest eyðsýndur í hesum kappingarárinum. Ávísar dystir ger hann hinvegin rættiliga um seg, og hansara partur lá í øllum førum ikki eftir í gjár.

Hann var toppskjútti við 9 málum. Jugoslav Djumic prógvaði aftur sína støðu sum besti strikuspælarin í landinum. Hann fekk sjey mál.

*uni@sosialurin.fo*

# Ov stór sveiggj hjá Kyndli

**MANSHONDBÓLTUR** Kyndil hevur alt ov stór sveiggj í sínum úrslitum. Tí hóttir høvuðsstaðarliðið ikki av álvara í stríðnum um finalupláss

Uni Holm Johannesen

Hesaferð fekk Kyndil bara eitt stig. Tað hava havnarmenninir ikki ráð til, um teir ætla at bjóða av í stríðnum um finalupláss.

Liðið hjá Henrik Gerster hevur verið sera óstøðugt í ár. Kyndil hevur mist fleiri stig móti StÍF, H71 og VÍF, og tað ber illa til, tá kollfirðingar missa fá stig.

Bárður Johannesen var stórspælandi hesaferð. Aftur og aftur fór hann buldrandi gjøgnum verjupartin hjá StÍF. Hann skeyt meira enn helmingin av málunum hjá Kyndil. Hann fekk 10 mál í alt.

### Lítið skipað álopsspæl

Annars var lítið veiggj í álopsspælunum hjá bæði Kyndli og StÍF. Tað var lítil ferð á, og hugflog var einki. Neyvleiking restaði av álvara í. Tað vóru bara Bárður Johannesen og Marius Joensen, sum høvdu dirvi at taka ábyrgd.

Bæði liðini høvdu møguleikan at avgera dystin í seinastu løtu. Bárður Johannesen javnaði til 19-19, tá ein hálvur minuttur var eftir. StÍF misti bóltin í uppspælinum, og tað gav heimaliðnum ein seinasta møguleika at fáa fult. Tað eydnaðist ikki.

Josef Abrahamsen, sum hevur verið spælskipari hjá Kyndli í fleiri dystum, var ikki við hesaferð.

*uni@sosialurin.fo*